# Listastevnan hongd upp á Hafnia




REKLAMA

*Rúnar Reistrup*

Fólk frá Tórshavnar Sløkkiliði og reklamuvirkinum Team 85 baksaðust í gjár við at fáa ein fjøruti fermetrar stóran reklamudúk upp á veggin á Hotel Hafnia.

Tað er Listastevnan 2004, sum ger vart við seg sjálvan á ein øðrvísi hátt á higartil størsta reklamudúki, sum nakrantíð er gjørdur í Føroyum.

Við hesum dúki hangandi beint oman fyri Áarvegin vónar Listastevnan uttan iva at fáa ein ólavsøkugest ella tveir eitt skeita uppeftir og geva Listastevnuni, ið byrjar eina viku seinni, ein tanka.

Arbeiðið at fáa dúkin upp at hanga gekk væl, og á Áarvegnum kundu leiðarin á hotellinum, Martin Restorff og annar av eigarunum Johan Restorff, væl nøgdir hyggja at, meðan hotelveggurin fyri fyrstu ferð varð brúktur sum reklamusúla.

Sum kanska ikki so fá havnarfólk minnast hevur sami veggur tó einaferð fyrr verið nýttur til okkurt slag av framsýning, men tað er longu langt síðan nú.

## Ein gamal miðil

Alsamt fleiri uttandura lýsingar prýða, ella, alt eftir hvat eyga sær, misprýða størru býirnar í landinum. Uttandura veggir á tætt fólkaðum støðum munnu vera elsti lýsingarmiðilin yvirhøvur, men tá bløð fingu litir og, ikki minst, tá sjónvarpsstøðir fingu loyvi at senda lýsingar, minkaði áhugin fyri vanligum veggjum.

At reklamuvirkir og lýsarar nú aftur eru farin at vísa væl placeraðu veggjunum áhuga er partvís av peningaligum orsøkum og partvís av tí, at fólk hava vant seg við at skeita framvið lýsingum í bløðum og skifta kanal, tá lýsingar fara yvir sjónvarpsskermin.

Her á landi er tað serliga reklamuvirkið Team 85, sum hevur dúvað uppá uttandura lýsingar. Team 85 umsitur lýsingarplássini á øllum býarbussunum í Havn og hevur eisini fleiri skeltir ymsastaðni.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og eystri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, seinnapartin mest av vestri. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Fleyr til gul av vestri ella av ymsum ættum. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Týsdagin lot av útsynningi og okkurt ælið, men mikudagin veksur hann vindin av landsynningi og regn. Hitin millum 10 og14 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 10 |
| Nuuk | 11 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 12 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 21 |
| Tromsø | 14 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 18 |
| Bukarest | 21 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 27 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | -- |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | -- |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 17 |
| New York | 26 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 28 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | -- |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 993 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1016 hPa. í útsynning úr Írlandi fer í landnyrðing og dýpist.




**Í dag:**
Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum verður yvir Føroyum sunnudagin og fer síðani væntandi norðureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 15/07 kl. 06[00]–16/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 11,3°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 15/07 kl. 06[00]–16/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 20,3 mm

www.sosialurin.fo




fæst á apotekunum kring landið

## VESTFALLSKYRRINDI

9. juli: Seinna kvarter
14. juli: Mánin longst frá jørðini
17. juli: Tendring
25. juli: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. juli | 07.37 | 20.00 | 06.37 | 19.00 | 06.52 | 19.15 | 09.37 | 22.00 | 10.37 | 23.00 | 05.52 | 18.15 | 04.52 | 17.15 | 07.52 | 20.15 | 08.52 | 21.15 | 07.22 | 19.45 | 08.37 | 21.00 |
| 18. juli | 08.22 | 20.45 | 07.22 | 19.45 | 07.37 | 20.00 | 10.22 | 22.45 | 11.22 | 23.45 | 06.37 | 19.00 | 05.37 | 18.00 | 08.37 | 21.00 | 09.37 | 22.00 | 08.07 | 20.30 | 09.22 | 21.45 |
| 19. juli | 09.06 | 21.27 | 08.06 | 20.27 | 08.21 | 20.42 | 11.06 | 23.27 | — | 12.06 | 07.21 | 19.42 | 06.21 | 18.42 | 09.21 | 21.42 | 10.21 | 22.42 | 08.51 | 21.12 | 10.06 | 22.27 |
| 20. juli | 09.48 | 22.09 | 08.48 | 21.09 | 09.03 | 21.24 | 11.48 | — | 00.27 | 12.48 | 08.03 | 20.24 | 07.03 | 19.24 | 10.03 | 22.24 | 11.03 | 23.24 | 09.33 | 21.54 | 10.48 | 23.09 |
| 21. juli | 10.27 | 22.46 | 09.27 | 21.46 | 09.42 | 22.01 | 00.09 | 12.27 | 01.09 | 13.27 | 08.42 | 21.01 | 07.42 | 20.01 | 10.42 | 23.01 | 11.42 | — | 10.12 | 22.31 | 11.27 | 23.46 |

5 707265 100067 >